VB-GÍ 0-3 (0-1):

# GÍ fekk samband

**Tað var um reppið, at »einki samband er við fartelefonina« tónin kom til Gøtu, men við sigrinum á VB fekk GÍ tikið seg somikið nógv upp, at níggjunda plássið nú bara er eitt stig burturi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Annað vikuskiftið á rað skuldi GÍ til Suðuroyar, og trýstið á spælarunum var ikki minni hesaferð. Við bara fýra stigum fyri fyrsta triðingin av kappingini sá tilveran alt annað enn bjørt út, og við dysti móti liðnum, sum undan uppgerðini var næstaftast, var kravið hjá gøtumonnunum heilt einfalt. Ein sigur og einki annað kundi góðtakast.

### GÍ slapp væl

Og tað eydnaðist eisini at fáa sigurin. Við einum hart arbeiðandi miðvølli, sum hesaferð innihelt bæði Sámal Joensen og Súna Olsen eydnaðist fyri tað nógva gøtumonnunum at halda spælinum uppi á VB-hálvuni.

Hetta var kansak eisini sambært spæliætlanini hjá VB, ið fyri tað nógva hevði vónir um kontrafótbólt, men tað gjørdist tó sjáldan talan um nakað upplagt høvi til hetta. Gøtumennnir høvdu bæði tol og disciplin í sínum spæli, soleiðis at óneyðugir møguleikar ikki vórðu givnir fyri einki, og tað eydnaðist teimum eisini at koma á odda fyri steðgin, tá Sámal Joensen kom at standa væl fyri eftir innlegg.

Kanska skuldi ein hildið, at hetta fór at noyða VB longur fram á vøllin, men tað hendi tó ikki. Heldur royndu teir at halda fast í grundspælinum, har bundið varð fyri í verjuni, men leiðsluni í bakhondini hevði GÍ ikki tann stóra tørvin á at trýsta alt ov nógv. Og tá teir so eisini øktu um leiðsluna, gjørdist mest sum leyst og liðugt.

Hesaferð byrjaði Sámal sjálvur álopið, og umvegis Súna Olsen varð bólturin sendir til ein púra leysan Krzystof Popczynski, sum ikki sveik álitið á gamla heimavølli sínum. Og tá Súni so eftir nærum obligatoriska frísparksmálið økti til 3-0, var leyst og liðugt. Tá royndi VB annars at tveita nakað av fólki fram, men trý mál kundu teir ongantíð taka innaftur.



*Væl mannaði GÍ-miðvøllurin fekk í longum løtum lætt spæl móti VB, sum bíðaði og bíðaði eftir kontra-møguleikanum, sum ongantíð kom*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Kreppan flutt suðureftir

Fyrstu nógvu umførini hevur krepputosið í føroyska fótbóltsheiminum fyri tað nógva snúð seg um GÍ og KÍ, men hetta tykist nú vera flutt. Seinastu fimm dystirnar hevur VB bara fingið eitt stig, og tað sæst eisini aftur á talvuni. Har er VB nú bert eitt stig framman fyri GÍ, men skal metast eftir dystinum sunnudagin, so er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn hetta eisini er broytt.

## Fakta um dystin

**VB-GÍ 0-3 (0-1):**
0-1: Sámal Joensen
0-2: Krzystof Popczynski
0-3: Súni Olsen
Dómari: Eiler Rasmussen
VB: Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Súni úr Hørg, Kári í Lágabø – Poul N. Poulsen (Nenad Zivanovic, 56.), Edvard Ble, Milan Kuljic, Símun Samuelsen – Dan Djurhuus, Mikael í Lágabø (Jón Krosslá Poulsen, 46.)
GK: Edvard Ble, Jón K. Poulsen
GÍ: Meinhardt Joensen – Jónreið Dalheim, Robert Rzeczycki, Kaj Ennigarð (Atli Gregersen, 48.), Hanus Jacobsen – Símun Louis Jacobsen, Sam Jacobsen, Súni Olsen, Sámal Joensen (Magni Jarnskor, 71.), Áslakur R. Petersen (Poul Arni Jacobsen, 79.) – Krzystof Popzynski
GK: Robert Rzeczycki

## Skifta heimavøllin

Lagið var í toppi hjá gøtumonnum, tá vit eftir dystin í Vági fingu orðið á teir. Sigurin var eitt krav undan dystinum, og sum Sámal Joensen tók til, so vildi eitt tap verið katastrofalt fyri liðið.

- Tú kanst ætla, at hetta hjálpti upp á lagið. Høvdu vit tapt, so vóru sjey stig upp bara fyri at fáa kontakt við hini liðini, og tað vildi verið ein skandala. Nú er talan so bara um eitt stig, og tað kunnu vit taka innaftur, helt hann.

Komandi umfarið hava gøtumenn heimavøll móti ÍF. Ein dystur, har GÍ altoftast stendur seg væl, og sjálvur tykist Sámal eisini vóna, at tann dysturin kann geva stig av sær.

- Tað plagar jú at ganga væl hjá okkum móti ÍF. Ikki minst í Gøtu, men nú veit eg ikki, um dysturin verður har. Fólk eru í øllum førum farin at tosa um, at vit kanska skuldu flutt heimavøllin til Vágs. Tað tykist so vera einasta staðið, har vit fáa nøkur stig, helt hann skemtandi.

-jm

## Dawid fekk ikki loyvi at spæla

Seinastu vikurnar hevur tað verið pólverski Marcel Dawid, sum hevur vart GÍ-málið, men hann var ikki millum stólparnar sunnudagin.

Ístaðin var tað Meinhardt Joensen, sum spældi sín fyrsta dyst á besta GÍ-liðnum. Hann breyt annars armin stutt eftir, at hann hevði gjørt sáttmála við GÍ, og tí gjørdist neyðugt við øðrum loysnum á málverjaspurninginum.

Her endaði alt við, at Dawid varð læntur frá VB/Sumba, men leigusáttmálin innihelt eisini nakrar klausular. Millum annað, at Dawid ikki skuldi verja málið, tá VB var mótstøðuliðið, og hetta var so orsøkin til, at málverjin hjá GÍ hesaferð æt Meinhardt Joensen.

-jm


Starvslýsing www.runavik.fo




Eitt starv sum byggifrøðingur á Teknisku Deild er leyst at søkja til setan 1. august 2005.

**Um Teknisku deild**
Tekniska deild umsitur øll teknisk mál sum sambart lóg eru áløgd kommununi. Deildin virkar harumframt sum umsiting hjá avvarandi nevndum.
Tekniska deild er ídag mannað við einum verkfrøðingi og einum byggifrøðingi.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við leiðaran av teknisku deild, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving, eftirliti og øðrum uppgávum sum deildin annars tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**
- Byggimálsviðgerð í samband við galdandi byggisamtykt/býarskipan
- Endurskoðan/víðkan av verandi byggisamtykt/býarskipan
- Fyrisiting av viðlíkahaldi av kommunalum bygningum
- Uppmátingar og avseting

**Vit leita eftir starvsfelaga ið**
- hevur útbúgving sum byggifrøðingur, helst við hollum royndum sum húsasmiður
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hollan kunleika til EDV, GIS, AutoCad
- hevur góð samskiftisevnir, bæði muntliga og skrivliga
- er opin og hevur lætt við at umgangast starvsfelagar og borgararnar í kommununi

**Vit bjóða tær**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi

**Setanarviðurskifti**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambart sáttmála millum Byggifrøðingafelagið og Føroya Landstýrið

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jógvan D. Jakobsen, býarverkfrøðing á telefon 417000

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsøkn í seinasta lagið 11.juni 2005

*Umsóknin skal sendast til:*

**Runavíkar kommunu**
Tekniska deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
Fo-600 Saltangará



**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*